## CIA ætlaði at myrða Castro

Amerikanska fregnartænastan, CIA, almannakunngjørdi í gjár nøkur skjøl, har teira millum annað avdúka at teir hava roynt at beint fyri kubanska leiðaranum, Fidel Castro. Avdúkingin er komin fram í 693 síður longu skjølunum, sum eru skrivað í 70'unum. Eitt tíðarskeið, har CIA ikk var væl lýtt millum fólk í Amerika. Í skjalinum framgongur eisini, at CIA hevði boðsent mafia-leiðaran, Johnny Roselli, til tess at beina fyri umstrídda kubanska leiðaranum.



## Ávegis bót nummar 100

Ein 40 ára gamal finni hevur so torført við at stýra sær, at hann seinastu fýra árini hevur fingið heili 99 bøtur. Nú skal hann enn einaferð í rættin, hesaferð skuldsettur fyri stuldur á einum hotelli, rán og ringan skikk undir avhoyringum. – Eg minnist so lítið, tá ið eg eri rúsaður, og trupulleikin er, at tað eri eg næstan alla tíðina, sigur maðurin við Bergensavisen. Maðurin, sum er búsitandi í Noregi, hevur sitið í varhaldi síðan apríl.

# Tveir stjórar í Smyril Line

**Nevndin í Smyril Line avgjørdi í gjárkvøldið at seta tveir fyribilsstjórar. Teir eru Hendrik Egholm og Rúni Vang Poulsen**

VINNA
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Hendrik Egholm er annar av fyribilsstjórunum í Smyril Line*

Eftir at tað kom fram í gjár, at stjórin á Smyril Line, Thomas Magnussen, hevði sagt upp, av tí hann ikki var samdur við nevndina í reiðarínum um leistin, felagið skal rekast eftir, avgjørdi nevndin at seta tveir fyribilsstjórar. Hesir eru søluog marknaðarstjórin, Hendrik Egholm, og fíggjarstjórin, Rúni Vang Poulsen. Aðalfundur var í dag, og tá skal eitt felag hava stjóra.

Andras Róin, nevndarformaður, upplýsir annars, at hann heldur fram sum sonevndur arbeiðandi nevndarformaður fulla tíð. Spurdur, hvussu leingi hendan støðan fer at vara, sigur Andras Róin:

- Vónandi ikki ov leingi!

Roknskapurin hjá Smyril Line varð góðkendur á aðalfundinum fyrrapartin.

# Føroyingar granska ov lítið

**Granskingin í Føroyum er ikki eins umfevnandi og í okkara grannalondum, ger Granskingarráðið vart við í nýggjum fráegreiðingum**

GRANSKING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í gjár skipaði Granskingarráðið fyri framløgu av eini kanning, sum ráðið tók stig til á heysti 2003.

Endamálið var at kanna, hvat tað almenna og vinnulívið gera fyri at granska, menna vørur og tænastur fyri at fremja nýskapan. Granskingarráðið hevur givið út fimm bóklingar, ið greiða frá um hesi evni.

Í einum samandrátti er niðurstøðan hjá Granskingarráðnum, at samanborið við onnur lond, granska Føroyar alt ov lítið.

Sagt verður m.a., at støðan tykist ikki vera góð. Í mun til hugmyndirnar og í mun til stevnumið og støðuna hjá øðrum londum lógu Føroyar í 2003 oftast í aftara endanum.

Tøl, sum sambært Granskingarráðnum eiga at vera høg, eru lág, og ymsu lutfølini eru ofta øvug av ideallutføllunum. Vinnan fíggjaði minni, enn hon granskaði fyri, og gransking í sambandi við hægri útbúgving var bara ein lítil partur av tí almennu granskingini.

Granskingarráðið greiðir frá í sínum samandrátti, at lítið skipað fokus var í granskingini. Meginorsøkin til hetta er helst vantandi granskingarpolitikkur. Gransking er borin av einstøkum stovnum og hegnisligum eldsálum eftir egnum raðfestingum, sum Granskingarráðið málber seg.

Hesi mugu av sínum eintigum finna eyka fígging, sum er neyðug afturat tí avmarkaðu almennu granskingarjáttanini.

### Vinnan nýskapandi

Eisini vil Granskingarráðið vera við, at vinnan í Føroyum var nýskapandi í árunum 2002-2004, samanborið við fyritøkur í Danmark og øðrum ES-londum. Samstundis bendir á, at vit kunnu síggja ein rímiligan nýskipanarinnsats í Føroyum, sum er næstan á sama støði sum í Danmark.

Í føroysku vinnuni var lítil og eingin gransking, og fyritøkur gjørdu lítið og einki við at verja nýskipanir. Hóast høga nýskipanarstigið vóru forðingar fyri nýskapan. Verða hesi viðurskifti tulkað sum heild, tykist føroyska nýskapanin meira eyðkend av smáum betringum enn stórum frambrotum.

### Politikkskipanin er veik

Sum heild fær politiska skipanin ikki góð skotsmál í fráegreiðingunum. Grundleggjandi veikleikar eru bæði í sjálvum politikkinum fyri gransking og nýskapan og í háttinum, hesin politikkur verður gjørdur. Í nógvum førum vanta atfinningarsamar funktiónir í heildartilgongdini »politikkmenning og eftirmeting«, og nógv restar í, áðrenn føroyingar kunnu siga, at í Føroyum hava vit eina væl virkandi og samanhangandi skipan, ið sambært upplýsingum um gongdina, ger politikk og setur miðvís tiltøk í verk.

### Fróðskaparsetrið fáa betri umstøður

Granskingarráðið mælir tí til, at Fróðskaparsetrið skal hava umstøður til at arbeiða miðvíst við at styrkja granskingarførleika og útbúgvingartilboð.

Fyritøkur skulu kenna tørv á nýskapan, sum byggir á gransking, og her er politiska uppgávan at gera forðingarnar minni.

Markamótið millum alment og privat skal styrkjast, har partarnir ávirka hvønn annan á professionellan hátt.

Uppgávan er at orða ein yvirskipaðan granskingar- og nýskapanarpolitikk, ið skapar teir neyðugu karmarnar fyri alemnnari gransking og vinnuligari nýskapan. Neyðugt er at bøta um samskiftið, og at politikarar, fyrisiting og granskarar semjast, so at politikkurin veruliga fær ávirkan. Tað er týdningarmikið, at politiska skipanin raðfestir hetta arbeiðið høgt, og at skipanir verða settar í verk, sum eftirmeta politikkin, metir Granskingarráðið.

## Frændafundur

**Í hesum døgum verður skipað fyri Frændafundi í Norðurlandahúsinum**

RÁÐSTEVNA
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í 1990, sama ár sum Fróðskaparsetur Føroya helt 25 ára hátíð og varð gjørt til universitet, skrivaðu rektararnir á Fróðskaparsetri Føroya og við Háskóla Íslands avtalu um vísindaligt samstarv millum stovnarnar. Í tí liggur, at stovnarnir vilja fremja samstarv millum granskarar á Fróðskaparsetri Føroya og við Háskóla Íslands. Til at fáa hetta í lag vórðu nevndir settar í báðum londunum til at hava samstarvið um hendur, og tær hava samstarvast á tann hátt, at tær hava skipað fyri ráðstevnu undir navninum Frændafundi triðja hvørt ár, fyrstu ferð í Íslandi 1992. Ráðstevnan Frændafundur er tvørfaklig og ráðstevnumál eru føroyskt og íslendskt.

Á skránni eru 26 stuttir fyrilestrar um føroyskt og íslendskt mál, barnabókmentir, samkynd, útlendingamál í londunum báðum, myndlist, tónlist, kommunusamanlegging og handbinding og sniðgeving fyrr, nú og í framtíðini.

Frændafundur, sum verður hildin í Tórshavn 25. – 29. juni 2007, er tann sætti í røðini og tann triði hildin í Føroyum.

Øll eru vælkomin, siga fyrireikararnir.